# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Semjur á tingi

Tað er rættiliga áhugavert, at ein nýggjur tingmaður tekur stig til at eggja til tvør-politiskar semjur á tingi. Tað er hetta, sum er endamálið við ætlanunum hjá Kára á Rógvi, løgtingsmanni Sjálvstýrisfloksins við tveimum semjusøkjandi sjakkum á tingi.

Kann vera at onkur av teimum gomlu, garvaðu tingmonnunum halda hetta vera tvætl frá einum ungum, akademiskum politikaraspíra.

Men latið okkum nú taka hetta fyri tað, sum tað er, at ein nýggjur tingmaður, sum er í andstøðu, vil hava ávirkan.

Vit hava so ofta hoyrt andstøðumenn sagt slíkt fyrr. Ikki minst hava Høgni Hoydal og Tjóðveldi undir seinastu samgongu gjørt vart við, hvussu lítið andstøðan verður tikin upp á ráð, og hvussu nógva orku samgongan brúkar til at fella andstøðuuppskot. Og hetta er altíð at hoyra frá skiftandi andstøðupolitikarum. Men hví ikki gera nakað við hetta? Nú kann nýggja samgongan vísa hetta í verki. Ikki minst nú, tá samgongan í summum førum kann hava brúk fyri atkvøðum úr andstøðuni, tá tær seytjan samgonguatkvøðurnar ikki røkka til.

Politisku leiðararnir í Føroyum, fyrst og fremst Jóannes Eidesgaard og Høgni Hoydal, hava nakað at prógva á hesum øki. Um teir nú telva rætt politiskt, so kunnu teir fáa í lag eitt gagnligt samstarv við andstøðuna. Og tað verður eisini gott fyri samgonguna, at andstøðan kennir seg at gera mun. Einki er so hugstoytt, sum at kenna seg uttan ávirkan.

Um hendan ætlanin hjá Sjálvstýrisflokkinum er gongda leiðin, skulu vit ikki taka dagar ímillum á hesum stað. Men vit ivast ikki í, at hugskotið er sera skilagott.

So okkara kæru kosnu kvinnur og menn! Takið væl undir við hugskotinum, og vísið nú í verki, at tað ber væl til at hava eitt gott og gagnligt samstarv tvørtur um floks- og samgongumørk – prógvið so eisini, at tann munandi bøtta kvinnuumboðanin og kvinnuávirkanin ger mun.

**Sosialurin**

## Boringin á Wissey gassfeltinum er nú liðug - og royndirnar vísa sera góð úrslit

**OLJUVINNA**

*Tíðindaskriv frá Faroe Petroleum*

Faroe Petroleum boðar frá, at Wissey framleiðslu-brunnurin, ið felagið eigur 18.75% av, er nú liðugt boraður við sera góðum úrsliti.

Boripallurin GSF Labrador er nú fluttur av loyvinum, sum Tullow Oil UK er fyristøðugfelag fyri. Tær teknisku royndurnar vístu nógv betri úrslit enn roknað var við, og mett verður nú, at parturin hjá Faroe Petroleum svarar til 2.200 tunnur av olju um dagin, tá umroknað verður frá gassi til olju. Framleiðsluøki liggur á bretska blokkinum 53/4D, umleið 10 km eystanfyri framleiðslupallin "Horne and Wren" sum Tullow eisini er fyristøðufelag fyri.

Gassið verður ført við rørleiðingi frá Wissey til "Horne and Wren", og síðani til Thames viðgerðarstøðina, har tað verður viðgjørt, áðrenn tað verður ført víðari til Bacton terminalin í Bretlandi.

Framleiðslan frá Wissey byrjar væntandi í seinnu helvt av 2008, og parturin hjá Faroe Petroleum, sum upprunaliga var mettur til at verða 1.800 tunnir um dagin, fer væntandi at liggja ímillum 1.800 og 2.200 tunnur um dagin (umroknað frá gassi til olju).

Fyri alt tíðarskeiðið, ið framleitt verður, er parturin hjá felagnum mettur til 5.9 milliardir kubikkføtur av gassi, sum svarar til umleið eina millión tunnir av olju, men møguleiki er fyri, at tað eru meiri gass kolvetni í Wissey kelduni.

Faroe Petroleum eigur í dag tilsamans 43 loyvir, íroknað 7 gass loyvir í Norðsjónum. Loyvini eru Wissey, Schooner, Minke, Orca, Topaz, Breagh and Trym.

Við árslok 2008 verður framleiðsla frá Wissey, Schooner and Minke, meðan hini fýra feltini væntandi verða útbygt til framleiðslu innan 2 ár.

Faroe Petroleum hevur uppá stutta tíð fingið tilvega eina framleiðsluportifølju í Norðsjónum, har onnur feløg eru fyristøðufeløg. Inntøkurnar eru gott fíggjarligt íkast til til teir 26 brunnarnar, sum felagið hevur lagt til rættis at bora tey komandi tvey árini.

Fullfíggjað tíðindaskriv á enskum er á heimasíðu felagsins www.faroepetroleum.com

## Semjusøkjandi sjakk á tingi

**POLITIKKUR**

*Tíðindaskriv frá Sjálvstýrisflokkinum*

Fyri at samvistskan hjá einstaka tingfólkinum skal fáa ta makt, sum stýrisskipanarlógin fyriskrivar, og fyri at koma burtur úr samgongu- og andstøðugravum, ætlar Kári á Rógvi, tingmaður, at skipa fyri semjusøkjandi arbeiðsbólkum á tingi.

Í hesi vikuni fer Kári á Rógvi, tingmaður, at bjóða til stovnandi aðalfund í tveimum tingfylkingum - semjusøkjandi sjakkum – ið skulu hava heitini Yngri á Tingi og Rættindi á Tingi.

Kári á Rógvi vísir á, at við tíðini eru tingfólk vorðin so bundin av flokkum og floksavtalum, at ásetingin í stýrisskipanarlógini, um at tingfólk bert eru bundin av samvitsku sínari, er tulkað burtur.

- Vit hava ikki bert fingið flokkar, men eisini samgongur, ið beint eftir val skriva samgonguskjal, sum í veruleikanum bindur tingfólkini niður. Ikki minst tey varafólk, ið koma á ting eftir at avtalan er undirskrivað, koma í nógvum førum at virka sum atkvøðuneyt, sigur tingmaðurin í viðmerkingum.

Fyrimyndina til arbeiðsbólkar av hesum slagi hevur Kári á Rógvi fingið bæði úr grannalondunum og úr Amerika.
Les meira hjá www.sjalvstyri.fo

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.